ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg fái meg ikki til at siga, at fascisman var ónd. Eg vil heldur siga, at hon var torskild*

*borgarstjórin í Rom*

# Fekk tvey børn við dóttur síni

**Í Póllandi er ein 45 ára gamal maður skuldsettur fyri at hava havt eina dóttir sum fanga og fyri at hava fingið tvey børn við henni**




*Tveir løgreglumenn leiða tann 45 ára gamla mannin út úr dómhúsinum*

*Mynd: Reuters*

Løgreglan tók tann 45 ára gamla mannin, eftir at dóttirin og mamman høvdu greitt løgregluni frá tí, sum hent var. Maðurin royndi at flýggja, men hann bleiv tikin í býnum Siedlca miðskeiðis í landinum. Í gjár var hann í rættinum í Siemiatycze, har dómarin gjørdi av at seta hann í varðhald, og har skal hann sita teir næstu tríggjar mánaðirnar, so løgreglan fær stundir til at kanna málið nærri.

Sambært fronsku tíðindastovuni AFP hevur tann 21 ára gamla dóttirin greitt løgregluni frá, at hon hevur verið fangi hjá pápanum, og at hann hevur neyðtikið hana fleiri ferðir, síðani hon var 14 ára gomul. Í februar í 2005 fekk hon eitt barn og aftur í januar í 2007, og løgreglan í Siemiatycze heldur fyri vist, at hon fekk bæði børnini, eftir at pápin hevði neyðtikið hana. Undir avhoyringum hevur dóttirin sagt, at pápin noyddi seg at lata børnini frá sær.

Fyrr í ár bórust tíðindi um eitt líknandi mál í Eysturríki, har tann nú 73 ára gamli Josef Fritzl er skuldsettur fyri at hava havt dóttir sína sitandi fanga í kjallaranum í 24 ár og fyrri at hava fingið sjey børn við henni.

- Í ein ávísan mun kunnu vit siga, at hetta málið líkist Fritzl-málinum, sigur polski løgreglutalsmaðurin Mariusz Sokolowski við sjónvarpið TVN24.

### DNA-kanningar

Løgreglan fer nú at biðja um kanningar, so tað kann staðfest, um tann 45 ára gamli maðurin er pápi teir báðar smádreingirnar, sum dóttirin fekk. Millum annað ætlar løgreglan at fáa fatur á teimum báðum dreingjunum og at taka DNA-royndir av teimum, sum tað kann staðfestast, um tann 45 ára gamli er pápi teirra. Talsmaðurin hjá løgregluni sigur, at báðir dreingirnir vórðu ættleiddir, meðan teir vóru á sjúkrahúsi, og tí verður nú kannað, hvar teir eru í dag, skrivar AFP.

Sambært polskum miðlum skal kvinnan hava greittløgregluni frá, at hon var innistongd í einum rúmi, og at hon bara slapp út nakrar fáar ferðir, eitt nú tær báðar ferðirnar, tá hon skuldu eiga. Hon skal eisini hava greitt frá, at hon slapp ongantíð út einsamøll, men at pápin altíð var við henni.

# Bendt Bendtsen fer frá

**Bendt Bendtsen gevst sum formaður í Konservativa Fólkaflokkin um og sum ráðharri í búskapar- og vinnumálum**

Tað hevur ligið í luftini í seinastuni, at formansskifti var á veg í Konservativa Fólkaflokkinum, og tí kom tað ikki óvart á danir, tá fjømiðlarnir í morgun boðaðu frá, at Bendt Bendtsen hevði gjørt av at siga formansstarvið og ráðharrasessin frá sær. Ístaðin fyri fer hann at stilla upp til Evropatingið.

Tað kom heldur ikki óvart á nakran, at Lene Espersen tekur við sum floksformaður fyribils, tí hon hevur leingi verið mett sum krúnprinsessan í flokkinum. Samstundis sum hon tekur við formansstarvinum, verður Lene Espersen eisini búskapar- og vinnumálaráðharri. Løgmálaráðið, sum hon hevur umsitið, fara eftir øllum at døma til floksfelagan Brian Mikkelsen, sum frammanundan er mentamálaráðharri.

Enn er ógreitt, um Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, fer at nýta hetta høvið til eina størri umskipan í stjórnini.

Bendt Bendtsen, sum er 54 ára gamal, hevur verið formaður hjá teimum konservativu síðani í novembur í 2000 og búskapar- og vinnumálaráðharri síðani juni í 2002.



*Bendt Bendtsen*

*Mynd: Polfoto*

# Hansara atkvøður hvurvu

**Á landsfundinum hjá republikanarunum varð John McCain tilnevndur forsetavalevni. Men hann var ikki tað einasta uppskotið**

Undan landsfundinum høvdu luttakararnir fingið at vita, at Ron Paul stillaði upp ímóti John McCain, og umboð úr fleiri statum høvdu sagt, at tey ætlaðu sær at atkvøða fyri avbjóðaranum. Men tá upptaljingin bleiv kunngjørd, hevði Ron Paul ikki fingið eina einastu atkvøðu.

Los Angeles Times skrivar, at Ron Paul fekk atkvøður frá umboðum úr nøkrum statum so sum Alaska, Oklahoma, Oregon, Washington og West Virginia, men sambært einum blaði í Oklahoma bleiv mikrofonin í fundarhølinum sløkt, tá umboðini haðani skuldu siga, hvønn tey styðjaðu.

Los Angeles Times skrivar, at Mitt Romney, sum kappaðist við John McCain um uppstillingina, fekk tvær atkvøður á landsfundinum, og tær blivu skrásettar. Tær hjá Ron Paul hvurvu á ein ella annan løgnan hátt, skrivar blaðið og rør uppundir, at tað kanska hevði samband við, at Ron Paul hevur verið ein tann harðasti mótstøðumaðurin ímóti Irak-politikkinum hjá Bush-stjórnini.



*Ron Paul*

*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT

### Al-Qaeda hartar iranar

Ayman al-Zawahri, sum verður hildin at vera varaleiðari í yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda, kemur við hvøssum atfinningum at Iran og iransku leiðsluni á einum nýggjum sjónbandi, sum júst er almannakunngjørt á arabisku sjónvarpsrásini Al-Jazeera.

Á sjónbandinum, sum al-Qaeda hevur sent út í sambandi við sjey ára dagin síðani atsóknina at New York og Washington tann 11. septembur í 2001, leggur Ayman al-Zawahiri iranska stýrið undir at samstarva við USA um atgerðirnar í Irak og Afghanistan. Harafturat hartar hann iranska stýrið, tí tað viðurkennir stjórnirnar í Bagdad og Kabul.

Næsti maður Osama bin-Laden fýlist eisini á, at ov fáir shiamuslimar fara til Irak at berjast ímóti teimum útlendsku hermonnunum, sum al-Zawahiri umrøður sum krossfarar.

### Oprah vil ikki hava Palin

Kendi amerikanski sjónvarpsverturi Oprah Winfrey hevur elvt til nógv orðaskifti í USA, tí hon hevur sagt nei til at bjóða republikanska varaforsetavalevninum, Sarah Palin, at taka lut í einari av sínum sera væl umtóktu sendingum.

Oprah Winfrey hevur ikki dult fyri, at hon styðjar demokratin Barrack Obama og vil hava hann til amerikanskan forseta. Fleiri amerikanskir fjølmiðlar og viðmerkjarar siga, at tað er ikki annað enn rímiligt, at Sarah Palin verður boðin í eina av sendingunum, sum ofta snúgva seg um kvinnur og evni, sum serliga hava áhuga hjá kvinnum.

Oprah Winfrey vísir atfinningunum aftur. Hon sigur, at hon hevur gjørt av, at einki av valevnunum sleppur í hennara sendingar, og so er tað líka mikið, um talan er um menn ella kvinnur, sigur hon. Hon ásannar, at Sarah Palin er avgjørt ein áhugaverdur gestur at fáa í sjónvarpsstovuna, men leggur afturat, at tað má bíða til aftan á valið.